# Fáa hóskandi svar




*Palestinski sjálvmorðsbumbumaðurin tók átta ísraelsmenn við sær í deyðan.*

**Ísrael fer at hevna sjálvmorðsatsóknina, sum kravdi níggju mannalív**

ÍSRAEL
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Mamma tann 21 ára gamla Sami Salim Hamed, sum var úr Jenin á Vestara Áarbakka, visti ikki betur, enn at sonurin var farin til arbeiðis, men seinnapartin í gjár sprongdi hann seg í luftina við einari sjálvmorðsbumbu uttan fyri eina matstovu við eina bussstøð í Tel Aviv. Hann tók átta ísraelsmenn við sær í deyðan, og 65 onnur vórðu særd.

Tveir palestinskir felagsskapir kannaðu sær atsóknina, og stjórnarflokkurin Hamas kunngjørdi, at palestinar hava rætt til at fremja slík álop, so leingi ísraelsmenn søkja at palestinum. Mahmoud Abbas, forseti, fordømdi harafturímóti atsóknina.

Bumban brast, júst sum ísraelska tjóðartingið helt sín fyrsta fund síðani valið herfyri, og Ehud Olmert, forsætisráðharri, segði, at Ísrael fer at koma við tí, sum kann lýsti sum eitt hóskandi svar. Tað hevur vakt ans, at Hamas sigur palestinar hava rætt til at fremja slík álop.

-Støðan er broytt. Tann gamla palestinska stjórnin styðjaði ikki yvirgangin, men tað ger Hamas, og vit fara nú at gera av, hvat vit gera við eina slíka stjórn, segði ein ísraelsk stjórnarkelda í gjárkvøldið.

# 100 ár síðani jarðskjálvtan í San Fransisco

**Tað, sum hendi tann 18. apríl í 1906, kann henda aftur, og næstu ferð verður skaðin uppaftur størri enn tá**

JARÐSKJÁLVTI
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Klokkan í San Fransisco var 05.12 tann 18. apríl í 1906, tá ein harður jarðskjálvti brádliga skakaði býin. Sjálvur skjálvtin og eldurin, sum stóðst av honum, kostaðu meiri enn 3.000 mannalív, og umleið 250.000 gjørdust heimleys.

Jarðskjálvtin tann 18. apríl í 1906 var 7,9 á Richter-stiganum, og jarðfrøðingar eru á einum máli um, at tað sama kann henda aftur. Tann stóri spurningurin er, nær tað verður. Amerikanski jarðfrøðistovnurin U.S. Geological Survey heldur, at tað er stórur vandi, at "thr Big One" fer at raka San Fransisco innan 2035.

Amerikanarar hava kannað, hvat kann henda, um ein líka harður jarðskjálvti verður í San Fransisco, sum í dag meiri enn tíggju ferðir so nógvar íbúgvar sum fyri hundrað árum síðani. Metingin sigur, at ein so harður jarðskjálvti fer at leggja 130.000 hús og bygningar í oyði, umleið 700.000 fólk verða heimleys, og talið á deyðum fer upp um 3.000 eins og í 1906.

Metingarnar siga eisini, at tað fer at taka nógv ár at endurbyggja býin, og at ein so umfatandi vanlukka fer at ávirka kaliforniska búskapin í mong ár.


formula.fo



miðlahúsið
í Vágsbotni

Hvønn dag í apríl mánaða verða Sudoku uppgávur at finna í Sosialinum.

Jú fleiri uppgávur, ið tú hevur loyst, tess størri møguleika hevur tú at vinna.

Sendið okkum loysnirnar innan 3. mai kl. 10.00 og viðmerkið brævbjálvan "Sudoku".

Vinningurin er ein Fujitsu Siemens Amilo Pro V2035 fartelda frá Formula.fo, virði 7.995,- kr.

Fujitsu Siemens Amilo Pro V2035 hevur m.a.:
· Intel Celeron M380 Processor · 1,6 GHz Celeron proccessor · 1 MB Cache · 512 MB DDR2 RAM PC533 · 60 GB S-ATA Harðdisk · DVD+/-RW DL Brennara · VIA N800 Grafikkkort upp til 64 MB · Ljóðkort & Stereo Hátalarar · 10/100 Mbit netkort · 4 x USB 2.0 · 15" WXGA TFT skíggja · Tráðleyst netkort GemTek 802.11 BG · 56K V.90 modem MDC1.5 · Windows XP Pro DK (MUI)

Drigið verður fyrstu vikuna í mai.

Fyri at vera við í kappingini, skulu allar uppgávurnar verða loystar

apríl
SUDOKU KAPPING

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 7 | | 6 | | | 9 | | | 5 |
| | 2 | | 7 | | 4 | | 8 | |
| | | 4 | | | 8 | 1 | | 2 |
| 8 | 5 | 1 | | 2 | | | 9 | |
| | | | 9 | | 6 | | | |
| | 6 | | | 3 | | 8 | 2 | 7 |
| 9 | | 5 | 1 | | | 2 | | |
| | 3 | | 6 | | 5 | | 1 | |
| 6 | | | 8 | | | 9 | | 3 |

SERA LØTT

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 2 | | 8 | 7 | | 5 | 1 | | 4 |
| | | | 2 | | 3 | | | |
| 3 | | | | | | | | 9 |
| | 8 | | 3 | 7 | 9 | | 4 | |
| | 3 | | | | | | 1 | |
| | 6 | | 1 | 4 | 8 | | 7 | |
| 8 | | | | | | | | 5 |
| | | | 8 | | 6 | | | |
| 4 | | 9 | 5 | | 7 | 6 | | 3 |

LØTT

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | 2 | | 1 | | | |
| | | 9 | | | 4 | | 6 | |
| 1 | 8 | 4 | | | 6 | | | |
| 7 | 4 | 8 | | | | 5 | | |
| | | 1 | | | | 7 | | |
| | | 6 | | | | 3 | 4 | 9 |
| | | | 1 | | | 9 | 3 | 7 |
| | 9 | | 4 | | | 8 | | |
| | | | 7 | | 5 | | | |

MIÐAL

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 7 | 8 | | 9 | | | | 2 | |
| | | 2 | 4 | | 6 | | | 9 |
| 3 | | | | | | | | |
| 4 | 7 | | | 8 | | | | |
| | | | 2 | | 7 | | | |
| | | | | 6 | | | 1 | 8 |
| | | | | | | | | 5 |
| 5 | | | 6 | | 8 | 4 | | |
| | 2 | | | | 1 | | 9 | 3 |

TRUPUL

NAVN:______________________ BÚSTAÐUR ______________________

Sendið til: Sosialurin · Box 76 · 110 Tórshavn. Merkið brævbjálvan "Sudoku"

Sosialurin
Tórsgøta 1 · P.O. Boks 76 · FO-110 Tórshavn · Tel 34 18 00
Fax 34 18 01 · post@sosialurin.fo · www.sosialurin.fo